# Nóta-skip loysa eisini

Vilmund Jacobsen

- Partarnir eru hampiliga væl nøgdir. Fyri nótaskipini er tað gleðiligt, at skipini nú kunnu loysa, tí lodnufiskiskapur stendur fyri framman, sigur reiðaríið í Gøtu

Tá nevndin í Føroya Reiðarafelag týsdagin kunngjørdi, at hon frásigur sær uppgávuna at samráðast við manningarfeløgini vegna limirnar, og at limunum nú stendur frítt at gera sum frægast, fóru feløgini, sum umboða ymisku skipabólkarnar í beinleiðis samráðingar við manningarfeløgini.

Felagið Nótaskip bað beinanvegin um fund við manningarfeløgini, og áðrenn fundurin, sum var í hølunum hjá Føroya Fiskimannafelag, var lokin, var semja um sáttmála fyri restina av hesum árinum.

Skulu vit nevna eitt mál hjá hvørjum parti, sum er broytt í nýggja sáttmálanum, ynsktu manningarfeløgini at fáa flogferðir goldnar, um maður hevur verið mynstraður í ein mánaða ella meiri. Hetta var áður hálvur triði mánaði.

Hetta ynskið varð gingið á møti.

Hyggja vit so at hinari síðuni, fekk Felagið Nótaskip í sáttmálan, at landingarútreiðslur skulu dragast frá óbýttum.

Avtala varð eisini gjørd um hetta.

- Nú kunnu nótaskipini so loysa. Partarnir eru hampiliga væl nøgdir. Fyri nótaskipini er tað gleðiligt, at skipini nú kunnu loysa, tí lodnufiskiskapur stendur fyri framman, sigur www.vinnan.fo á síni heimasíðu.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Línuskipini hava nú sáttmála

**Við sáttmálanum, sum varð undirskrivaður millum manningarfeløgini og Felagið Línuskip hósdagin, eru nú tveir sáttmálar millum manningarfeløg og skipabólkar og ein sersáttmáli gjørdur**

Vilmund Jacobsen

Stutt fyri klokkan 18 hóskvøldið samdust manningarfeløgini við Felagið Línuskip um nýggjan sáttmála fyri restina av hesum árinum. Nýggi sáttmálin er galdandi til 31. desember 2011.

Fundur millum partarnar var í hølunum hjá Føroya Fiskimannafelag allan seinnapartin hósdagin, og feløgini samdust umsíður um ein nýggjan sáttmála sum ger, at línuskipini nú kunnu loysa.

Bert smærri broytingar eru í nýggja sáttmálanum.

Ein er, at manningin rindar ein part av reiðskapinum og ein onnur, at partarnir hjá yvirmonnum eru fastfrystir, soleiðis at partarnir ikki veksa, tá manningartalið minkar.

Við sáttmálanum millum manningarfeløgini og Felagið Línuskip, eru nú tveir sáttmálar millum manningarfeløg og skipabólkar komnir upp á pláss, umframt at ein sersáttmáli.

Umframt hendan sáttmálan, er sáttmáli eisini gjørdur millum manningarfeløgini og Felagið Nótaskip. Haraftrat hava manningarfeløgini undirskrivað sáttmála við felagið, sum eigur verksmiðjutrolaran, Norðborg.

*vilmund@sosialurin.fo'*



*Teir, sum eiga línuskipini, kunnu nú við góðari samvitsku loysa, tí nýggjur sáttmáli er undirskrivaður*

# Hvat ger Reiðarafelagið?

**Eingin veit at siga, hvat fer at spyrjast burtur úr Føroya Reiðarafelag, nú felgið hevur kastað handklæði í ringin, og skipabólkar - hvør í sínum lagi - gera sáttmálar**

Vilmund Jacobsen



*Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen, hevur fyribils kastað handklæði í ringin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Slík viðurskifti, sum tey, vit í dag síggja millum manningarfeløg og reiðarar, hava ikki verið áður í nýggjari tíð, ei heldur í gamlari tíð, sum menn vita um at siga.

Í vikuni segði fyrrverandi formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Óli Jacobsen, sum hevur fylgt samráðingum og verið partur av samráðingum í eini 40 ár, at slíkt, sum nú er hent, ikki áður er hent í hansara tíð.

- Eg haldi, at støðan tykist kaotisk, og fyri mær sær tað út, sum Viberg Sørensen, formaður í Føroya Reiðarafelag, hevur givið skarvin yvir.

Eingin veit í løtuni at siga, hvat fer at spyrjast burtur úr hesum, men fáur velur at trúgva, at Føroya Reiðarafelag fer í upployson.

Fólk, sum Sosialurin hevur tosað við og sum hava staðið samráðingunum nær, sum verið hava seinastu dagarnar millum manningarfeløg og skipabólkar, siga, at hetta er ikki nøkur ynskistøða hjá nøkrum av pørtunum.

- Eg kann ikki trúgva annað enn, at Føroya Reiðarafelag fer at koma aftur í aftur og kemur at gerast ein leiðandi partur hinumegin borðið hjá manningarfeløgunum.

Keldan, sum Sosialurin hevur tosað við og sum hevur verið við til samráðingarnar millum manningarfeløg og skipabólkar, sigur seg ikki duga at meta um, nær sáttmálarnir við teir bólkar, ið eftir eru, koma undir land.

- Ein stórur bólkur, sum er eftir, er Felagið Trolskip, sum enn ikki hevur gjørt nakran sáttmála. Tað hava eitt nú lemmatrolarar, flakatrolarar, garnaskip og rækjuskip heldur ikki, sigur keldan.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Volunteer seldur til Strendur

**Jack Højgaard, sum í nógv ár hevur átt og rikið línubátin Volunteer, hevur nú selt bátin til Strendur**

Vilmund Jacobsen

Línubáturin Volunteer er ikki longur heimahoyrandi í Runavík, har hann hevur havt heimstað heilt síðan 1979.

Ímyndin av hesum línubáti gjøgnum hesi mongu ár, hevur verið Jack Højgaard, sum vit síggja á hesi myndini.

Volunteer hevur leingi staðið á sølulista, og í dag veit heimasíðan www.skipini.com at siga, at báturin nú er seldur til felagið, Sp/F Volli á Strondum.

Heimasíðan veit eisini at siga, at skrásetingin av nýggju eigaraviðurskiftunum fór fram hin 27. januar í ár.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Jack Højgaard hevur verið ímyndin av línuskipinum Volunteer í mong ár*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*